# Almenn áheitan

á limirnar í Fíggjarnevndini, sum gjørdu semju um íløguætlanina í undirstøðukervi fyri 2009

KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður



**Endurskoði íløguætlanina. Nýti ein part av ætlaðu íløgunum til alneyðugan rakstur. Støðgi tekni og framtíðar planleggingunum av nýíløgum í vegir og tunnlar í hundrað millióna- klassanum. Uppraðfesti heldur neyðugar umvælingar av verandi bygningum, vegum, tunnlum og almennum ognum; tað kemur veruliga at geva arbeiði til fleiri hendur**

Landstýrismaðurin við ábyrgd fyri fíggjarlógini sigur, at fíggjarlógin er eitt verri upptak og at fatalar broytingar og faktuellir feilir eru gjørdir av Fíggjarnevndini.

Serliga innan skúla, mentan- og almannamál, hevur stórur ótryggleiki valda, við fráboðan um afturlating av almennum tilboðum, ætlandi uppsagnir av starvsfólki og niðurraðfesting av tilboðum, har ætlanin var at uppraðfesta. Tað hendir, hóast fíggjarnevndarlimir tvíhalda um, at meir peningur er játtaður og umstøðunar sostatt skuldu verið betraðar.

Landstýriskvinnan í almannamálum hevur fráboðað, at hon fekk boð um at spara, og tað hevur hon gjørt. Landstýriskvinnan í mentamálum sigur seg lítla og onga ávirkan hava havt á fíggjarlógina. Løgtingslimir úr samgongu og andstøðu skiftast um at átala og vaska hendur, støðan er ótolandi og higartil eru pensjónistar, børn og ung við serligum tørvi, útbúgving og skúli serliga meint rakt.

Nógvar av raðfestingunum, gjørdar vórðu í Fíggjarnevndini, eru á tekniborðinum og verða startskotið til verkætlanir í hundrað-milliónа klassanum. Fleiri av hesum ætlanum verða neyvan veruleiki, við hóttandi framtíðarútlitunum, hóast hesar hava fingið eina C-átekning. Er tað tá rætt í slíkum føri, at brúka nógvan pening til tekning og projektering ?

Vit mugu repa seglini samsvarandi hóttandi veðurforsøgnini og vitanini um fíggjarliga illveðrið, sum byrjaði í USA og nú herjar kring heimin. Vit eru í eini bíðistøðu, tí eiga vit nú heldur at nýta møguleikan at røkja almennu ognirnar sum treingja til viðlíkahald. Føroyskir handverkarar eru tøkir og arbeiðslønin, ið fylgir eftirspurninginum er normaliserað. Vit eiga ikki at niðurbinda føroyska samfelagið, við at byrja ovurstórar íløgur í nýggjar vegir og tunnlar sum tola at bíða nøkur ár afturat.

**Tíðin er komin, at vit mugu raðfesta: Alneyðugt, neyðugt og ynskiligt**.

# Svar

ÁKI BERTHOLDSEN
blaðm

Eg ætli mær ikki í alment kjak við borgarstjóran í Vági tíðindaflutningin úr Vágs Býráð á hesum sinni.

Men yvirskriftin í greinini er vald út frá tí óronginliga veruleika, at Vágs Býráð er einasta kommunustýri í Suðuroy, sum framvegis tosar um at skipa Suðuroy í tvær kommunur. Øll hini kommunustýrini hava fleiri ferðir boðað frá, at skal oyggin leggja saman, skal tað vera í eina kommunu.

At tað skal vera so stórt framstig, at Vágs Býráð nú vil kanna fyrimunir og vansar við einari- ella tveimum kommunum í Suðuroy, veldst sanniliga um eyguni í síggja.

Sum gongdin hevur verið í Suðuroy seinastu hálvu øldini, er tað mær rætt og slætt ein gáta, at kommunurnar í Suðuroy ikki hava sett hol á hetta arbeiði fyri árum síðani.

Kirstin Strøm Bech sipar eisini til onnur áhugaverd mál, sum vóru á skránni í Vági. Nú hevur hon verið so mikið leingi í politikki, at hon átti at vita, at tað er ikki óvanligt, at spjaða tíðindi frá einum tiltaki yvir fleiri bløð.

Endin á lesarabrævinum hjá borgarstjóranum í Vági, kann tykjast órættvísur: Sosialurin er ikki eitt heppikór hjá Vágs Býráði. Men er tað nakar, ið hevur skriva um viðurskifti í Vági og í Suðuroy sum heild, eisini tey jaligu, er tað undirritaði. Og uttan at gera meg til talsmann fyri nøkrum, má ásannast, at hvat kommunusamanlegging viðvíkur, er altso ikki nógv jaligt at skriva um í Suðuroy, tú fyri mær at síggja, hava kommunurnar í fleiri ár runnið undan síni ábyrgd á hesum øki- alt ímeðan at fólkatalið í Suðuroy minkar og minkar og minkar.......

# ABC er ein vanlukka

BILL JUSTINUSSEN
løgtingsmaður



Nú fáa børn við serligum tørvi, menningartarnað, fólk við serliga truplum sjúkum og pensionistar rokningina fyri vánaligu stýringina hjá ABC-samgonguni. Í fleiri ár hevur Miðflokkurin ávarað um, at avleiðingarnar av at minka um skattainntøkur landskassans verður eitt samfelag, har minni rúm verður fyri at bjóða teimum veikastu tey neyðugu tilboðini. ABC-samgongan hevur við sínum skattalættum minkað um inntøkur landskassans við umleið 300 milliónum um árið, og sjálvandi gjørdist støðan, at almennar útreiðslur mugu minkast eins nógv. Tí standa landsstýrisfólkini nú við stóra spurninginum: hvar skal sparast.

Og landsstýriskvinnan við almannamálum hevur funnið nakrar sparingar. Fólk við aspergersyndromi skulu flyta bústað, familjudeildin á Barnaheiminum skal niðurleggjast, viðgerðarhúsini Rókin og Slóðin skulu leggjast saman, dagtilhaldini hjá pensionistum missa sín stuðul, javningin í pensjónunum verður minkað úr 4% í 3% og so framvegis. Og fyri alt hetta fær fíggjarnevndin skuldina. Tað er altíð onkur annar, sum fær skuldina. Men fíggjarnevndin kann illa hava ábyrgdina, tí har eru ongar sparingar framdar. Tað einasta, fíggjarnevndin hevur gjørt, er at STEÐGA VØKSTRINUM í almennum útreiðslum. Tað merkir, at nýggj størv og tilboð ikki skulu setast á stovn. Tað merkir ikki, at stovnar og tænastur skulu niðurleggjast.

**Játtanin til børn og ung**

Tað er ófatiligt, at landsstýriskvinnan í almannamálum ikki ger tað, sum er mest sjálvsagt at gera, tá tað snýr seg um játtanina til børn og ung. Í staðin fyri at leggja stovnarnar Rókina og Slóðina saman og niðurleggja familjudeildina á Barnaheiminum, átti hon at fingið tey børnini, sum í dag eru á samdøgursstovnum í Danmark, heimaftur til Føroya og veitt teimum hjálpina í Føroyum. Tí hvør er munurin á einum donskum námsfrøðingi ella sálarfrøðingi og einum føroyskum? Veruleikin er, at tað kostar samfelagnum nærum tvífalt at senda børn av landinum heldur enn at lata tey fáa tilboðini í Føroyum. Fyri tað fyrsta fáa tey flestu, sum høvuðsbarnaverndin sendir til Danmarkar, pláss á samdøgursstovni, og fyri tað næsta gjalda donsku námsfrøðingarnir og sálarfrøðingarnir ikki skatt í Føroyum. Viðgerð á samdøgursstovni kostar munandi meiri á dagstovni. So har eru pengar at spara. Donsk starvsfólk, sum fáa løn fyri føroyskar pengar, gjalda ikki skatt í Føroyum, so har eru pengar mistir. Tilsamans er talan um nógvar milliónir. Heldur velur landsstýriskvinnan at minka um tilboðini í Føroyum. Avleiðingin verður, at útreiðslan fyri tað almenna helst verður størri. Tí hesi, sum nú ikki kunna fáa familjuviðgerð á Barnaheiminum, mugu helst fara av landinum at fáa viðgerð, og tað er altíð dýrasta loysnin.

Rósa Samuelsen! Tak teg saman og finn upp á okkurt annað enn hesar ússaligu loysnirnar, sum er reinur ágangur á tey allarveikastu í okkara samfelagi. Landsstýrið situr sum ryssa yvir deyðum fyli. Er tað so, at tit ikki kunnu koma við nøkrum betri, er tíð uppá, at tit lata onnur taka yvir. Tað ber ikki til at sita á maktini, bara fyri maktina skuld. Megnar man ikki at hugsa fram loysnir, sum gagna fólkinum, er skilabest at halda seg burtur frá maktini.

Eg havi ringar vónir um, at hetta skeiðið við ABC-samgonguni fer at vera gott fyri Føroyar. Byrjanin prógvar eina samgongu, sum bæði er ódugnalig og virkislamin.

# Tí atkvøddi eg ikki

ANNFINN BREKKSTEIN
býráðslimur



Á býráðsfundi hóskvøldið 19. feb 2009 gav ein meiriluti í Tórshavnar Kommunu loyvi at samráðast um lánstreytir til eitt lán upp á góðar 200 mill.kr.. Síðani kemur málið aftur á býráðsfund til endaliga støðutakan. Eg metti ikki, at eg visti, hvat eg atkvøddi fyri tí tað lá eingin frágreiðing ella nærri, útgreinan hvat pengarnar skuldu brúkast til. Eg eri vælvitandi um, at nógvar íløgur eru samtyktar, men peningur manglar til at seta tær í gongd við, men ein útgreinan eigur altíð at fyriliggja, so borgarin veit hvat, hvagar skattakrónurnar fara.

Men tað sum gjørdi, at eg ikki var ílatin til støðutakanina, var málið um eina eykarokning upp á stívliga 20 mill.kr. til Glyvursveg. Her hevur meirilutin í Tórshavnar Kommuna fullkomiliga mist tamarhaldið á skattaborgarans peningi. Men tað sum skelkaði enn og meir, var at eykarokningin upprunaliga var upp á 35 mill. kr., men er spard niður á stívliga 20 mill.kr..

Tí metti ikki, at fyriliggjandi upplýsingar vóru nøktandi at heimila Býráðnum at upptaka lán. Málið kemur fyri býráðið aftur, tá lánstreytirnar fyriliggja. Vónandi eru meira fullfíggjaðar upplýsingar tøkar, tá tað endaliga loyvið skal viðgerast í býráðnum seinni í ár.

Men prinsippielt eri eg ikki ímóti at læna pening, tí tað er júst í hesum tíðum, vit skulu hava hjólini malandi, fyri ikki at alt skal steðga upp. Við einari álíkning á knappar 600 mill.kr., er einki í vegin í so máta at hava eitt lán á 200 mill.kr..

Men eg skal líka gera vart við, at rakstarútreiðslurnar í tíðarskeiðnum 2004 til 2008, eru øktar frá kr. 312 mill. til kr. 485 mill., tað er heili 55%, sostatt ein markantur vøkstur. Vit kunna rokna við einari inntøkuminking í ár og næsta ár, so tað ræður um at planleggja neyvt og stýra skattaborgarans peningi við ábyrgd.

Tórshavnar Kommuna er annars ein vælvirkandi kommuna við nógvum góðum tilboðum til bæði ung og gomul. Við viti og skili skulu tilboðini økjast ár undan ári. Tað skal verða gott at búgva í Tórshavnar Kommunu.